# Leiðari

**til teknisku deildina**
**hjá Sunda kommunu**

Sunda kommuna hevur samtykt at seta tekniska deild á stovn. Søkt verður tí eftir leiðara til deildina.

**Starvið**
Tú kemur sum leiðari av teknisku deild at taka tær av leiðsluni av allari fyrisiting av deildini, herundir eftirlit og projektering av nýgerð og viðlíkahaldi av ognunum hjá kommununi.

Sum leiðari verður tú eisini ráðgevi, málsviðgeri og skrivari hjá teknisku nevndini og brunanevndini. Leiðarin kemur eisini at ráðgeva øðrum nevndum í kommununi.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir persóni íð er útbúgvin sum verkfrøðingur/byggiverkfrøðingur, ella hevur aðra viðkomandi tekniska útbúgving og góðan teldukunnleika. Royndir innan almenna umsiting er ein fyrimunur.

**Vit bjóða tær**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fær møguleika til at byggja upp og menna teknisku deildina frá byrjan av.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. januar 2006 ella eftir nærri avtalu. Starvið verður lønt sambært galdandi sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Hava tygum áhuga, so eru tygum vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Sunda kommunu, Oyrarbakkavegur 3, Postboks 10, 400 Oyrarbakki, og skal henda vera kommununi í hendi í seinasta lagi 15. november 2005 kl. 16.00.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 471020 ella Heðin Zachariasen borgarstjóra tlf. 212182.

Oyrarbakki, tann 24. oktober 2005

# Reingerðingsfólk

Søkt verður eftir reingerðisfólki til:

**Hósvíkar skúla/bygdarhúsið**
**Almenna wc í Hósvík**

at byrja skjótast tilber.

Lønin er sambært sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir skulu sendast til: Sunda kommunu, Oyrarbakkavegur 3, Postboks 10, 400 Oyrarbakki og skulu hesar vera kommununi í hendi í seinasta lagi **4. november 2005**.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 471020.

**Sunda Kommunu**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Bioanalytikari

Rannsóknarstovan á Landssjúkrahúsinum søkir eftir avloysara fyri bioanalytikara í barnsburðarfarloyvi. Starvið er frá 2. januar 2006 til og við 30. desember 2006. Starvið er eitt fulltíðarstarv við tilkallivakt heimanífrá.

Rannsóknarstovan húsast í nýggjum hølum og hevur góðar arbeiðsumstøður.
Rannsóknarstovan er eitt integrerað laboratorium, har øll 5 serøkini innan bioanalytikarafakið er umboðað, umframt ambulatorium á LS og á læknamiðstøðini í Runavík

Í løtuni starvast her uml. 20 bioanalytikarar, 2 skrivarar og 1 hjálparfólk. Allir bioanalytikararnir skifta millum tey ymsu serøkini.

**Arbeiðsuppgávurnar** verða í fyrsta umfari innan kliniska biokemi og ambulatoriivirksemið.

**Førleikakrøv**
– Bioanalytikaraútbúgving
– Góð samstarvsevni og fleksibilitetur

**Løn- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Bioanalytikarafelagið og Fíggjarmálaráðið

**Umsóknarfreist** 16. desember 2005 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

**Nærri fæst at vita** við at venda sær til leiðandi bioanalytikara Ivy Hansen, tlf 304599, lokal 5601 ella teldupost ivyh@lsh.fo

Skrivlig umsókn í brævbjálva merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini fyri Skála bygd

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund hósdagin 10. november 2005 kl. 10.00 í gamla skúla í Skálafirði.

Til viðgerðar verður útskifting av matr. nr. 539, Skálafjall Miðjan, og matr. nr. 541a, Skálafjall Ytripartur, Skála bygd.

Nevndarlimir eru Marita í Brekkunum, Hósvík og Jørleif Kúrberg, Tórshavn.

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útsk. form.

# Leiðari

**til sosialu deildina**
**hjá Sunda kommunu**

Sunda kommuna hevur samtykt at seta sosialu deild á stovn. Søkt verður tí eftir leiðara til deildina.

**Starvið**
Tú kemur sum leiðari av Sosialu deild at taka tær av leiðsluni av allari fyrisiting av deildini, herundir málsviðgerð av almannamálum, sum sambært lóggávuni eru ella verða løgd til kommununa. Sum leiðari verður tú eisini ráðgevi, málsviðgeri og skrivari hjá barnaverndarnevndini. Leiðarin skal eisini vera við til at byggja upp barnaverndartænastuna, so henda verður virkin tann 1. januar 2006, tá kommunurnar yvirtaka hana. Leiðarin kemur eisini at hava samskifti við m.a. tannlækna, kommunulækna, skúlaheilsusystir, dagstovnar, kommunalu dagrøktina og landsmyndugleikar.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir persóni, íð er útbúgvin sum sosialráðgevi. Tó kunnu eftir umstøðum eisini aðrir umsøkjarar lúka treytirnar, um teir hava aðra í minsta lagi miðallanga útbúgving innan heilsu-, almanna-ella skúlaverk.

**Vit bjóða tær**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fær møguleika til at byggja upp og menna Sosialu deildina frá byrjan av.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. desember 2005 ella eftir nærri avtalu. Starvið verður lønt sambært galdandi sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Hava tygum áhuga, so eru tygum vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Sunda kommunu, Oyrarbakkavegur 3, Postboks 10, 400 Oyrarbakki, og skal henda vera kommununi í hendi í seinasta lagi 14. november 2005 kl. 16.00.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær kommunuskrivstovuna tlf. 471020 ella Heðin Zachariasen borgarstjóra á telefon 212182.

Oyrarbakki, tann 24. oktober 2005

# Lærari til Hoyvíkar skúla

Søkt verður eftir lærara frá 21. november 2005 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi. Lærarin skal undirvísa 5. flokki í føroyskum, donskum, enskum, kristni, søgu og ítrótti. Undirvísingartímatalið er 20. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Birgit Arge, skúlastjóra, á telefon 315073.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Hoyvíkar Skúli
Postrúm 3073
110 Tórshavn

**Lis Mortensen**
Formaður fyri skúlastýrið